













# Nýggj sethús í Hoyvíkshaga Suður

Ovarlaga í Hoyvíkini – í Hoyvíkshaga Suður, hevur tú nú møguleika at ogna tær eini nýggj og nútímans sethús frá 2005.

Í hesum nýggja umhvørvinum í Hoyvíkshaga Suður er sera barnavinarligt. Bert 200 m til vøggustovu og barnagarðin í Løgmannabreyt og í Maritugøtu. Til Hoyvíkar Skúla, frítíðarskúlan og Hoyvíkshøllina eru bert fáir minuttir til gongu. Eisini er stutt bæði til gongu og við bili til Keypssamtøkuna í Hoyvík.

Húsini, sum eru í einari hædd, hava eina stóra og rúmliga gongd, eitt baðirúm, køk og stovu í einum, trý kømur og eitt kombinerað gestavesi/vaskikjallari. Í tí eina kamarnum er eitt innbygd skáp við dragihurð. Í gongini eru svartar granit flísar lagdar á gólvið framman fyri úthurðina. Gólvini í baðirúminum og vaskirúminum eru sveisað vinyl. Øll hini gólvini eru hvít oljerað eik. Allir veggirnir í húsunum eru hvítir og klæddir við sløttum filti. Loftini eru træloft, tó eru loftini í gongini og køkini/stovuni málaði hvít. Innhurðarnar eru hvítar og sløttar.

Køkurin og stovan eru í einum. Køkurin er sera snotiligur og arbeiðsvinarligur. Hvítur við stál hondtøkum og stál hvítvørum. Borðplátan er svørt laminat – ein partur av borðplátinum er úr svørtum granitti.

Eitt óinnrættað loft er, og her er góður møguleiki at gera fleiri kømur.

Ein skúrur hoyrir til húsini, har møguleiki er fyri at seta súkklur, amboð o.a. inn.

Húsini eru ikki málað og rundan um húsini er tað ikki gjørt liðug, so her er góður møguleiki hjá tær at seta tín egna dám á.

Tú fært meira at vita um ognina við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Add:. | Viljormsgøta 6, Hoyvík |
| Byggiár: | 2005 |
| Hæddir: | 1 |
| Støðd innan: | 115 fermetrar |
| Grundøkið: | 400 fermetrar |
| Prísuppskot: | kr. 2.600.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**